

## USB-jólatræ

Jólini eru í nánd, og ikki óvæntað gevur hetta eisini hugflog til ymsa skrivstovuútgerð frá gadgets.dk. Millum annað ber nú til at keypa sær eitt lítið jólatræ, sum lýsir, tá tað verður sett til USB-portrið á telduni. Fyri tær 99 krónurnar, sum træið kostar, fæst eisini jólapynt, sum kann klippast út, áðrenn tað verður hongt á træið, og so skuldi av álvara verið klárt til jólamánaðin.

## 100 mió heimasíður

Enska Netcraft hevur síðani 1995 arbeitt við at skráseta allar heimasíður á alnetinum. Tá felagið byrjaði, taldi listin 18.000 síður, men hetta talið er støðugt vaksið. Somikið nógv, at talið í oktobur fór upp um 100 mió heimasíður, og eingin orsøk er at halda, at hetta tal fer at minka. Av skrásettu síðunum er á leið 1% síður við pornografiskum tilfari.

*Framhald av síðu 29*



tey sum í framtíðini ætlað sær at gera íløgur í føroyska vinnu hevði atgongdin verið lættari, táið viðurskiftini eru normaliserað og upphæddirnar, ið skula forrentast og avskrivast, aftur standa hóskiliga í mun til rakstrarmøguleikan av keyptu veiðirættindunum, sum øll nú hava frælsa atgongd til. Mælt varð til, at útbjóðingarskeiðið ongantíð skuldi vera longri enn ein ársfjórðingar, harvið var tryggjað ein kontinuerlig atgongd til sortimangið, sum tilfeingisbúðin lá inni við. Peningastovnarnir høvdu komið í eitt meira realistiskt viðskiftið við vinnuna, fingið veð í veruliga virðinum og ikki fyri mesta partin sum nú, í einum hugsaðum politiskum merglopnum ryggi. Regionalu trupulleikarnir kundu verið loystir, nú útjaðarin aftur hevði fingið atgongd til og møguleikan at keypa burturav tilfeinginum. Rættarstøðan hevði verið eins fyri allar borgarar. Ongin eigur framíhjárættindi. Hetta hevði javnað íkomna sosiala ójavnan aftur, og dynamikkurin hevði fingið eitt gypp í afturpartin, táið skipanin sjálv hevði framt útveljingina. Samsvarandi dugnaskapi og effektiviteti.

Við tí lítlu umsiting sum andstøðuflokkur hevur tøka, til gerð av slíkum uppskoti, í mun til orkuna í útinnandi umsitingini, var sjálvsagt, at okkurt kundi verið meira umhugsað og snøggari ætlað. Tí løgdu vit eina við, at hetta var uppskot sum kundi mýkjast, fyri at gera semjuna so breiða sum gjørligt. Vit hildu og halda, at uppskotið var ein reformur, sum í størsta mun tænti fólksins áhugamálum, vinnuni og samfelagnum sum heild, og væntaðu tí, at politiskar royndir fóru at vera gjørdar fyri at røkka eini semju. Men so eiðasørt. Sum vanligt í føroysku politisku skipanini varð uppskotið tægað sundur, smávegis tekniskar forðingar vóru funnar, og negldar upp á bróstið, sum knakar, at hanga uppskotið á, har tað nú hongur sum ein gjørgnumjaglað slintra. Niðurskotið.

Uppskotið var ikki ætlað at vera ímóti nøkrum. Var bara ætlað at lynna undir og at fáa lógina um vinnuligan fiskiskap á beint aftur. At fáa sjálvregulerandi og sjálvberandi mekanismurnar at virka aftur. At menna vinnuna hagartil, at hon kom at geva optimalt avkast til allar partar í samfelagnum, ikki minst vinnuna sjálva. Trupult er at spáa um framtíðina, eisini um uppskot okkara var rætta leiðin at ganga. Vit ivast tó framvegis ikki í, at hetta hevði verið ein farvegur burturúr eini eftirhondini sperdari lóg, í stóran mun skeivglað av sjaldsamari umsiting. Hetta hevði verið ein nærum total liberalisering av allari føroyskari fiskiveiði, hetta hevði verið ein demokratisering, sum hevði gjørt orðini hjá Bresti og Gerhardi til veruleika: Ongin skal hjá ungum alva bragdarhugin forða. Í hesum førinum stívnaðar lógir, sum treingja til álvarsligar ábøtur. Og í triðja lagi hevði uppskotið tryggjað, at ogn Føroya fólks varð flutt aftur, harið hon hoyrir heima. Hjá fólkinum. Í seinasta lagi var hetta eisini ein roynd at tryggja tey nationalu áhugamálini, sum mega vera, at varðveita øll rættindi til tilfeingið á føroyskum hondum. Gleppa tey, av ósketni og lógligum skilaloysi, bera vit ikki boðini kortini, hvørki sum heimastýri ella sum republikk. Enda sum húskallar í egnum landi. Illa trevsaðir av kapitaláhugamálum í londum, sum eru ímillum tey mest protektionistisku í øllum heiminum. Har ongar dyr verða gloppaðar fyri fremmandum áhugamálum, serliga ikki, táið um tilfeingisvinnur teirra ræður. Tað stendst um at halda javnvágirnar, eisini á hesum fyri samfelagið so vitala øki. Bara soleiðis verður tú tikin fyri fult í grannalagnum, fyri ikki at siga í tí stóra alheiminum.

Fríggjadagin 10. november kom málið aftur úr vinnunevnd løgtingsins. Uppskotið, sum hevði demokratiserað og liberaliserað karmarnar um høvuðsvinnuna og samstundis staðfest veruliga ognarrættin til tilfeingið, fall táið bara 8 tjóðveldisfólk atkvøddu fyri tí. Tey, sum høvdu roknað við Javnaðarflokkinum fingu eina langa nøs. Vallyftið teirra, sum er endurstaðfest á fleiri landsfundum, fekk eina blanka atkvøðu, frá John Johannessen. Teir báðir miðflokkamenninir atkvøddu somuleiðis blankt og mest tragikomiska og paradoksala atkvøðan mundi vera hon hjá formanni Sjálvstýrisfloksins, sum atkvøddi blankt, hóast flokkurin í landsfundarsamtykini kvøldið eftir sendi eina bulletin út, sum var meinlík uppskotinum hjá Tjóðveldisflokkinum. Restin atkvøddi ímóti. Og sendi harvið tey boð út um allar geilar, serliga út um landoddarnar, at festararnir av føroyska landgrunninum, og føroyskum tilfeingi yvirhøvur, nú eiga óavmarkaða rættin at selja. Signalini frá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum síðani, hava bara cementerað hendan veruleikan uppaftur meira. Og vargur er aftur komin í keyp og sølur, og upphæddirnar sum útlendingar nú sigast vilja keypa føroyskt tilfeingi fyri eru so ørandi, at tær standa ikki í mát við nakran veruleika longur.

Roknast má við at landsstýrið, nú embætismannauppskotið fer at fáa eina politiska viðgerð í samgonguni, fer at staðfesta, at tilfeingið ikki longur er ogn Føroya fólks, men hinvegin ogn teirra, sum hava rullandi loyvini um hendur higani og til veraldar enda. Einaferð var tað bjargingin at skekla seg úr eini feudalskipan, men sum lívið er skikkað, hevur alt lyndið til at endurtaka seg, nú eru vit ávegis inn í eina nýggja feudaltíð, við sosialdemokratiska Javnaðarflokkinum sum gallíonsfiguri og stavnamanni Fólkafloksins sum róðurgangara. Tann viðvenda verð. Nú pendulið hjá hesum báðum flokkum sveiggjar í takt, so langt úti í høgra borði, at tað nóg illa hómast fyri politiskum fríggjarakondensi.

*"Heldur politiska skipanin, ella varnast hon, at strukturarnir eru skeivir í vinnuni, og í øllum øðrum samfelags høpum, somuleiðis, eigur hon at taka málið upp umgangandi, og gera nakað við trupulleikan. Til tað hava vit eina politiska skipan. Í hesum førinum eigur høvuðsmálið at vera, at lynna sum frægast undir hjá teimum sum ætla sær at reka vinnu heldur enn at lynna undir hjá teimum, sum ætla sær at liva av at selja almenn rættindi."*